# Námsskipan fyri Master í Dátuvísindum

# Fróðskaparsetur Føroya

Juli 2023

INNIHALD

1 Inngangur ..... 4
2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum ..... 4
3 Útbúgvingarstig (sbrt. QF – EHEA; EQF - LLL) ..... 4
4 ECTS-áseting ..... 4
5 Upptøkukrøv ..... 4
6 Endamál við útbúgvingini ..... 5
7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum ..... 5
8 Læruúrtøkur (yvirskipaðu læruúrtøkurnar í útbúgvingini) ..... 6
9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti: ..... 7
9.1 Bygnaðurin í útbúgvingini (yvirlit yvir, hvussu lestrarhálvurnar/skeiðini eru skipaði, herundir raðfylgjan av skeiðum, venjingum v.m.) ..... 7
9.2 Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum ..... 9
9.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini ..... 12
9.4 Starvsvenjing ..... 12
9.5 Ritgerðir (lýsa karmar í mun til bachelor og master) ..... 12
9.6 Metingarhættir (formativ og summativ meting) ..... 13
9.7 Próvtøkur ..... 14
9.7.1 Almennar reglur um próvtøkur ..... 14
9.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini ..... 14
9.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming ..... 16
9.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið ..... 17
9.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka ..... 17
9.7.6 Serlig atlit ..... 17
9.8 Undirvísingarmál ..... 18
9.9 Góðskriving ..... 18
9.10 Farloyvi ..... 18
9.11 Serlig atlit (sjúka, brek og annað) ..... 19
9.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar (t.d. lestrarvist) ..... 19
9.13 Luttøkuskyldu ..... 19
9.14 Lestrarvirkni ..... 19
9.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum ..... 20
9.16 Kærumøguleikar ..... 20
9.17 Vísindaligt rættlæti ..... 20

9.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv .... 20
9.19 Treytir um broyting í námsskipan.... 20
9.20 Aðrar ásetingar .... 21

# 1 Inngangur

Hendan námsskipanin er ein áseting fyri innihaldið í útbúgvingini “Master í Dátuvísindum”, og er hon grundað á løgtingslóg og kunngerðir um Fróðskaparsetur Føroya. Námsskipanin er av stórum týdningi, tí hon inniheldur grundreglurnar fyri lesturin. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Fróðskaparsetrinum er námsskipanin eitt týðandi amboð hjá studentunum, og kunnu tey við hesari kenna teirra rættindi og skyldur.

“Master í Dátuvísindum” útbúgvingin er staðsett á Náttúruvísindadeildini, og hevur dekanurin yvirskipaðu ábyrgdina av øllum útbúgvingum, sum eru staðsettar á deildini, meðan útbúgvingarleiðarin hevur fakligu ábyrgdina av  útbúgvingini. Útbúgvingin fylgir Bolognayvirlýsingini um eina felags evropeiska útbúgvingarskipan og er skipað eftir hesum leisti.

Lestrarráðið á Náttúruvísindadeildini góðkennir námsskipanina. Eisini hevur lestrarráðið eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Lestrarráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Henda námsskipanin er góðkend av virkandi dekani, tann 04.03.2024.

# 2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum

Master í Dátuvísindum – Master of Science in Data Science.

M.Sc. í Dátuvísindum – MSc in Data Science.

# 3 Útbúgvingarstig (sbrt. QF – EHEA; EQF - LLL)

Master (M.Sc.) “2nd cycle” sambært QF-EHEA, og stig 7 sambært EQF-LLL.

# 4 ECTS-áseting

Útbúgvingin M.Sc. í Dátuvísindum tekur tvey ár sum fulltíðarlestur, og fýra ár sum parttíðarlestur tá lisið verður hálva tíð, og samlaða talið av ECTS fyri útbúgvingina er 120.

1 ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar hjá einum miðal studenti. Eitt lestrarár við fulltíðarlestri er 60 ECTS svarandi til eina metta arbeiðsbyrðu á 1500-1800 tímar. Tá er allur lestraraktivitetur íroknaður.

# 5 Upptøkukrøv

## Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bachelorprógv í: 1) KT-verkfrøði ella teldufrøði; 2) aðrari KT-útbúgving ella 3) aðrari útbúgving í t.d., verkfrøði, støddfrøði, hagfrøði, alisfrøði, evnafrøði ella lívfrøði. Grundleggjandi

kunnleiki innan stødd- og hagfrøði, og innleiðandi forritan er neyðugur. Royndir innan KT er ein fyrimunur. Allar umsóknir verða viðgjørdar eftir nærri meting, tá tað ræður um fortreytir og tøk lestrarpláss. Góðir førleikar í enskum máli eru neyðugir.

### Viðmældar fortreytir

Fyri umsøkjarar við manglandi fortreytum er viðmælt at fyrireika seg við stakskeiðum, t.d. taka minst: 10 ects í støddfrøði, 5 ects í hagfrøði (helst við R), og 5 ects í innleiðandi forritan (helst við Python). Sum stakskeið úr KT-verkfrøði er viðmælt at taka skeiðini: Diskret støddfrøði, Lin. Algebra fyri KT-verkfrøðingar, Dátuvísindi og hagfrøði við RStudio, Innleiðandi forritan við Python. Annars, ynskiligt at taka tvey ella fleiri av hesum skeiðum eisini: Teldunetverk og datasamskifti, Databasur og SQL, Objektrættað forritan við Java 1, Innleiðing til Web-skipanir, Algoritmur og datustrukturar, Stýriskipanir ella Linux-skipanir, KT-trygd. Tilsvarandi stakskeið kunna eisini takast úr øðrum útbúgvingum.

## 6 Endamál við útbúgvingini

Endamálið er at hækka KT-førleikarnar hjá teimum lesandi til masterstøði innan dátuvísindi, og at geva grundarlag fyri framtíðar KT-gransking í dátuvísindum á ph.d-stigi. M.Sc. í Dátuvísindum byggir víðari á førleikarnar innan stødd- og hagfrøði, teldufrøði og forritan givnir í B.Sc. í KT-verkfrøði og útbýr serfrøðingar til KT-vinnuna og gransking. Høvuðsdenturin í útbúgvingini er lagdur á serútbúgving innan KT til dátugreining og tilgjørt vit (AI), umframt at masterskeið eisini vera í tólnet (IoT) og dátutrygd. Valskeið/verkætlanir svarandi til 30 ECTS kunna takast á Fróðskaparsetrinum, í samstarvi við KT-vinnuna, og/ella í samstarvi við onnur universitet (t.d. DTU) við undangóðkenning frá Fróðskaparsetri Føroya. Valskeið kunna takast innan dátugreining og tilgjørt vit, ella innan aðrar sergreinar, sum til dømis framhaldsskeið innan: forritan, tólnet ella KT-trygd.

## 7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum

**Talva 1 Lýsing av almennum og fakligum førleikum**

| **Almennir førleikar** | |
|---|---|
| Samskifti | Duga at samskifta munnliga og skrivliga um dátuvísindaligar KT-loysnir við serkøn á bachelor- og masterstøði, eins væl og við onnur, sum ikki eru serkøn. Í skrivligum frágreiðingum at endurgeva rætt og koma sær undan ritstuldri. |
| Starvsgrein | Megna at skilja ymisk vitanar- og virkisøki innan dátuvísindi sum starvsgrein. |
| Greinandi | Duga at brúka abstraktan og greinandi hugsanarhátt til útvegan av nýggjum hugskotum - til dømis til verkseting av nýggjum tænastum ella virkjum grundaðar á dátuvísindi. |
| Gransking | Duga vísindaligt háttalag og megna at fara undir granskingarverkætlanir á masterstigi innan dátuvísindi. Duga at miðla granskingarúrslit við antin framløgu, postara, ella sum vísindalig grein. |
| Altjóða samstarv | Kunna samstarva um menning og gransking innan dátugreining og tilgjørt vit við samstarvsfelagar uttanlands. |

| **Fakligir førleikar** | |
|---|---|
| Støddfrøðiligur førleiki | Duga at brúka støddfrøði og sannlíkindi til at sniðgeva og brúka maskinlærings-algoritmur innan dátuvísindi. |
| Dátugreiningarførleiki | Megna at skilja og brúka dátuvísindalig hugtøk, hagfrøðilig hugtøk og hagfrøðiligan ritbúnað í dátuvísindum. |
| Tøkniligur førleiki | Megna at skilja og læra, halda seg dagførda/n við, og brúka kunningar- og samskiftistøkni innan dátuvísindi við serligum denti á tilgjørt vit, tólnet og dátutrygd. |
| Telduførleiki | Duga at greina, modellera, sniðgeva, forrita og verkseta dátuvísindaligar KT-skipanir grundaðar á maskinlæring. |
| Førleiki í at loysa uppgávur | Megna at eyðmerkja og loysa uppgávur innan ritbúnað ella tólbúnað, sum brúktur verður til dátuvísindi við serligum denti á ritbúnað og tólbúnað , sum brúktur verður til maskinlæring, tólnet og innan KT-trygd. |
| Samstarvsførleikar | Duga at samstarva í sniðgevingar- og menningartoymum við verkætlanum innan dátuvísindi, og at leggja síni úrslit fram bæði skrivliga og munnliga. |
| Etiskir førleikar | Kenna bæði fyrimunir og vansar innan dátuvísindi, innan dátutrygd og persónsvernd, og etiskar avbjóðingar við menning og brúk av tilgjørt vit skipanum. |

# 8 Læruúrtøkur (yvirskipaðu læruúrtøkurnar í útbúgvingini)

Eftir lokna útbúgving er studenturin før/ur fyri at:

- lýsa dátuvísindalig háttaløg og vísindaliga metodu á masterstigi.
- lýsa nútíðar dátuvísindi, tilgjørt vit og etiskar avbjóðingar við nýggju tøknini.
- lýsa framkomin støddfrøðilig hugtøk, hagfrøðilig ástøði og líkindarokning, ið verða brúkt innan dátuvísindi.
- lýsa, greina og brúka framkomnar tólnet skipanir.
- lýsa, greina og brúka framkomnar skipanir til KT-trygd.
- sniðgeva og forrita endurskapandi dátugreiningar.
- sniðgeva og forrita dátuvísindaligar skipanir innan tilgjørt vit, tólnet og/ella KT-trygd.
- skjalfesta endurskapandi kotu innan dátuvísindi.
- lýsa, hvussu gransking í dátavísindaligum høpi verður framd, løgd fram og útgivin.
- leita fram og kritiskt meta um lærubøkur og vísindaligar bókmentir.
- lýsa ymiskar bókmentaligar keldur, bæði primer- og sekunderkeldur.
- lýsa, orða og kanna grundleggjandi granskingarspurningar og nýtslugranskingarspurningar við tí endamáli at bera fram nýggja vitan og/ella nýggjar nýtsluskipanir.

# 9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti:

9.1 Bygnaðurin í útbúgvingini (yvirlit yvir, hvussu lestrarhálvurnar/skeiðini eru skipaði, herundir raðfylgjan av skeiðum, venjingum v.m.)

Flestu fak í útbúgvingini eru kravd (skeið merkt við grønum í Talvu 2 og 3). Skeið merkt við gulum í Talvu 2 og 3 eru valskeið. Vanliga verður undirvíst tveir dagar um vikuna, og hvørt skeið endar við próvtøku (sí 9.7.2). Eins og Talva 2 og 3 niðanfyri vísa, strekkja øll skeiðini seg yvir hálva lestrarhálvu. Lestrarhálvurnar fyri parttíðarlestur eru býttar sundur í blokkar á 7,5 ECTS, har eitt skeið á 7,5 ECTS er á skránni í 8 undirvísingarvikur. Lestrarhálvurnar fyri fulltíðarlestur eru býttar sundur í blokkar á 15 ECTS, har tvey skeið á 7,5 ECTS eru á skránni í 8 undirvísingarvikur. Undantikið er masterverkætlanin, sum samsvarar ávikavist eina og tvær lestrarhálvur fyri fulltíðar- og parttíðarlestur. Í báðum førum svarar masterverkætlanin til fýra skeið (30 ECTS). Tó kann masterverkætlanin víðkast til 60 ECTS fyri fulltíðarlesandi, um serlig atlit tala fyri tí. Til dømis um útboðið av valskeiðum og smærri valfríum verkætlanum er avmarkað, ella um lesandi vísa serligan áhuga fyri gransking, og hava fulla tíð yvir eitt ár at fordjúpa seg í masterverkætlanini. Vanliga eru fýra próvtøkutíðarskeið í einum lestrarári fyri fulltíðarlestur, eitt eftir hvønn lestrarblokk við tveimum próvtøkum. Fyri parttíðarlestur eru eisini fýra próvtøkutíðarskeið í einum lestrarári, eitt eftir hvønn lestrarblokk við eini próvtøku. Próvtøkutíðarskeiðini eru í oktober, januar, mars og juni. Árskalendarin hjá NVD verður lagdur á Moodle á felagskunningarsíðu til studentarnar.

**Talva 2 Raðfylgjan í útbúgvingini (parttíðarlestur)**

| Lestrarhálva | | |
|---|---|---|
| 1. | 1. blokk | Innleiðing í tilgjørdum viti 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Hagfrøðilig læring 7,5 ECTS |
| | | |
| 2. | 1. blokk | Dátugrunnatøkni til stórdátur 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Maskinlæring 7,5 ECTS |
| | | |
| 3. | 1. blokk | Støddfrøði - grundarlag til tilgjørt vit 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Dátutrygd 7,5 ECTS |
| | | |
| 4. | 1. blokk | Tólnet og 5G 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Djúp læring 7,5 ECTS |

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| 5. | 1. blokk | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS |
| | | |
| 6. | 1. blokk | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS |
| | | |
| 7. | 1. blokk | MSc-verkætlan |
| | 2. blokk | MSc-verkætlan |
| | | |
| 8. | 1. blokk | MSc-verkætlan |
| | 2. blokk | MSc-verkætlan 30 ECTS |
| Samlað ECTS | | 120 |

**Talva 3 Raðfylgjan í útbúgvingini (fulltíðarlestur)**

| Lestrarhálva | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 1. blokk | Innleiðing í tilgjørdum viti 7,5 ECTS | Støddfrøði - grundarlag til tilgjørt vit 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Hagfrøðilig læring 7,5 ECTS | Maskinlæring 7,5 ECTS |
| | | | |
| 2. | 1. blokk | Dátutrygd 7,5 ECTS | Tólnet og 5G 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Djúp læring 7,5 ECTS | Dátugrunnatøkni til stórdátur 7,5 ECTS |
| | | | |
| 3. | 1. blokk | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS |
| | 2. blokk | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS | Valskeið/verkætlan 7,5 ECTS |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| 4. | 1. blokk | MSc-verkætlan | MSc-verkætlan |
| | 2. blokk | MSc-verkætlan | MSc-verkætlan 30 -60 ECTS |
| Samlað ECTS | | 120 | |

## 9.2 Innihald og ECTS í einstøku fakøkjunum

Í niðanfyristandandi yvirliti eru øll skeiðini í Talvu 2 og 3 (omanfyri) lýst. Tey geva tilsamans 120 ECTS – íroknað masterverkætlanina. Ynskja lesandi at taka onnur skeið enn tey her vístu skeiðini, t.d. uttanlands ella umvegis fjarlestur, so vil tað sum grundregla vera valskeiðini (gul í Talvu 2 og 3), sum kunnu býtast um við onnur skeið. Skeið, sum lesandi ynskja at taka á øðrum útbúgvingum, skulu undangóðkennast sambært galdandi reglum. Skeið, sum áður eru staðin á øðrum útbúgvingum, kunnu avriksflytast sambært galdandi reglum um avriksflutning (sí 9.9 góðskriving). Hædd skal takast fyri, at reglugerðin um avriksflutning ásetir, at skeið, sum eru staðin sum partur av lidnari útbúgving, kunnu sum útgangsstøði ikki avriksflytast.

- Innleiðing í tilgjørdum viti - 7,5 ECTS
  - Alllýsing av tilgjørdum viti.
  - Symbolskt mótvegis sub-symbolskt tilgjørt vit.
  - Intelligentir agentar og leitingar trupulleikar.
  - Kunnleiki og logikkur. Propositionel og fyrsti ordans logikkur, avgerðarreglur og hættir.
  - Yvirlit yvir brúk av leiting, logikki og sannlíkindum innan nútímans tilgjørd vit.
  - Almenn innleiðing í maskinlæring.
  - Rættvísi og helling innan tilgjørt vit, samfelagsligar og etiskar avbjóðingar við tilgjørdum viti.

- Støddfrøði-grundarlag til tilgjørt vit - 7,5 ECTS
  - Vektorar og matrisur, ymisk sløg av matrisum, og sundurbýting av matrisum (matrix factorization).
  - Vektorrúm, normar og innarifald (inner product).
  - Linjurættar ummyndanir (linear transforms) og eginleikar hjá teimum so sum kjarni og súlurúm.
  - Spektralsetningurin og einvirðisupploysing (singular value decomposition).
  - Differential støddfrøði (calculus): greinsuvirði, kontinuitetur, differentialkvotientar í einum og fleiri variablum, gradientar og optimering.
  - Almenn og víðarigangandi sannlíkindateori og hagfrøði til maskinlæring og data visualisering.

- Hagfrøðilig læring - 7,5 ECTS
    - Meta um neyvleika hjá modellum.
    - Viga “Bias-Variance” upp ímóti hvørt øðrum.
    - Einføld linjurøtt regressión og margføld linjurøtt regressión.
    - Flokkan: Logistisk regressión, K-næstu grannarnir, generativ modell til flokkan og generaliseraði linjurøtt modell.
    - Endursýnistøkuhættir: Kross-staðfesting og Bootstrap.
    - Ikki-linjurøtt modell: Fleirliðað regressión, grundleggjandi funktiónir og súðir (splines) til regressión.
    - Dátuvisualiseringshættir.

- Maskinlæring - 7,5 ECTS
    - Ensamble-háttaløg.
    - Support vektor maskinur (SVM).
    - Bagging.
    - Boosting.
    - Trægrundað háttaløg (Decision trees, Random forrest).
    - Lærihættir (innan: Unsupervised learning).
    - Viðmælara-skipan (Recommender system).
    - Endurstyrkjandi læring (Reinforcement learning).
    - Praktisk maskinlæring (t.d. maskinlæringar-workflow).

- Dátutrygd - 7,5 ECTS
    - Trygdarhugtøk: Trúnaður (confidentiality), integritetur, trúvirði (authenticity), tøki (availability), við denti á avbjóðingum og møguleikum við nýggju tilgjørt vit tøknini.
    - Dulmálsvísindi (cryptography) við denti á avbjóðingum og møguleikum við nýggju kvantu-teldutøknini (quantum cryptography).
    - Direktiv og mannagongdir fyri dátutrygd við ásetingum um, til dømis:
        - Politikk fyri dátutrygd, trygd av skipanum, og váðametingar av kritiskum skipanum.
        - Starvsfólka-atgongd, ábyrgd og upplæring.
        - Handfaring av trygdarbrotum og kreppustýring.
        - Nútíðaramboð at greina og seta í verk eina trygdarskipan.

- Tólnet og 5G - 7,5 ECTS
    - Net til farsamskifti (mobile communication): LTE og 5G.
    - Dátusamskifti í farnetum (mobile networks): GPRS, EDGE og LTE.
    - Tólnet tøkni.

- Rúmføri (capacity), røkkingarøki (coverage) og tænastur (services) hjá farsamskifti (mobile communication) og tólneti.

- Djúp læring - 7,5 ECTS
  - Maskinlæringarhugtøk so sum líkindafunktión, hámarkslíkindi (maximum likelihood) og backpropagation.
  - Fyritreytir og avmarkingar hjá ymiskum djúplæringarmodellum.
  - Greina úrslit frá djúplæringarmodellum í uppgávum og verkætlanararbeiði.
  - Nýta telduskipan til GPU forritan sum til dømis PyTorch.
  - Convolutional neural networks (CNN).
  - Recurrent neural networks (RNN).

- Dátugrunnatøkni til stórdátur - 7,5 ECTS
  - Stórdátu-eyðkennir og OLAP (Online Analytical Processing) mótvegis OLTP (Online Transactional Processing).
  - Multidimensionell myndlan, goymsla av myndlan, optimering av goymslu, og multidimensionellir fyrispurningar.
  - Uppsetan av dátuvøruhúsi og integratión av dátum frá fleiri dátukeldum við Extract-Transform-Load (ETL). Handfaring og viðlíkahald av dátuvøruhúsum.
  - Almenn innleiðing til útbýttar (distributed) dátugoymslur.
  - Replikatión og sambæri (consistency) av útbýttum (distributed) dátugoymslum.
  - Stórdátugreining.
  - Sergjørdar dátugrunnatøknir (NoSQL).

- Valfrí skeið og verkætlanir (kunnu umbýtast við tøk/góðskrivað skeið) 4 x 7,5 = 30 ECTS

  Hetta eru valfrí skeið innan til dømis hardware- og software skipanir, forritan, støddfrøði, hagfrøði, alisfrøði, verkfrøði, almenn skeið og verkætlanarskeið av týdningi fyri Dátuvísindi. Talan kann vera um at lesandi taka skeið, sum vanliga verða bjóðað út í KT-verkfrøði, ella skeið frá aðrari útbúgving á Setrinum. Talan kann tó í mesta lagi vera um at 15 ECTS kunna veljast sum valskeið á bachelorstigi, úr skeiðum, sum tann lesandi ikki áður hevur haft. Somuleiðis, um tann lesandi velur at taka valskeiðini frá øðrum lærustovni, er sama regla galdandi um at í mesta lagi 15 ECTS kunna vera valskeið frá bachelorútbúgvingum og minst 20 ECTS mugu vera frá masterútbúgvingum. Hetta er sama regla, sum er galdandi fyri masterlesandi í teldufrøði á KU.

  Skeiðini kunnu bæði breiðka førleikar, og/ella víðarimenna førleikar frá undanfarnum skeiðum. Møguleiki er fyri fulltíðarlesandi eisini at víðka masterverkætlanina frá 30 til 60 ECTS, ístaðin fyri at taka 30 ECTS sum valskeiðir.

- Verkætlanir - 30 ECTS (30-60 ECTS fyri fulltíðarlesandi)

Masterlesturin verður lokin við at gera eina verkætlan um eitt valt evni í Dátuvísindi og skriva eina samanhangandi og greiða frágreiðing um arbeiðið. Frágreiðingin skal verða skipað sambært vanligum reglum í vísindaligum frágreiðingum. Ritgerðin skal skjalfesta kunnleika til og fatan av nýttu tøknini, og tey nýttu hugtøkini innan eitt øki í Dátuvísindum.

## 9.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini

Undirvísararnir á Náttúruvísindadeildini hava tætt samstarv við serkøn og væl útbúgvin fólk frá almennum stovnum og privatum fyritøkum í Føroyum og uttanlands, sum eisini veita partar av undirvísing og vegleiðing.

Undirvísingin er í høvuðsheitum skipað soleiðis:

- Fyrilestrar.
- Telduvenjingar.
- Uppgávurokning.
- Sjálvlestur – fyrireiking til undirvísingina.
- Studentaframløgur/kjak.
- Verkætlanararbeiði í teimum skeiðum har læruúrtøkan er tongd at hesum.
- Studentar lata inn einstaklinga- og/ella bólkaarbeiði, sum í flestu førum er ein fyritreyt fyri at fara til próvtøka. Í summum skeiðum verður skrivliga innlatingararbeiðið próvmett og telur við sum partur av endaliga próvtalinum. Hetta er lýst nærri í skeiðslýsingunum.
- Afturboðan til skrivligu avrikini – munnligt og/ella skrivligt.

Undirvísingin fer fram í undirvísingarhølum og starvsstovum. Í ávísum skeiðum (t.d. KT-verkætlan, sum kann vera eitt valskeið) er vanliga ein rannsóknarferð til Fablab á Kambsdali.

## 9.4 Starvsvenjing

Starvsvenjing er ikki ein formligur partur av útbúgvingini. Tær flestu masterverkætlanirnar vera tó gjørdar í tøttum samstarvi við KT-vinnuna ella almennar stovnar.

## 9.5 Ritgerðir (lýsa karmar í mun til bachelor og master)

Útbúgvingin verður lokin við at gera eina masterverkætlan á 30-60 ECTS um eitt valt evni í Dátuvísindum, sum nærri lýst í í skeiðslýsingini fyri masterverkætlan. Vegleiðandi, skal ein masterritgerð á 30 ECTS vera umleið 40-70 normalsíður á 350-360 orð/síðu umframt fororð, samandrátt, innihaldsyvirlit og fylgiskjøl. Um talan er um masterverkætlan á 60 ECTS, skal ritgerðin vera umleið 70-100 síður. Á master í Dátuvísindum er ikki kravdur munur á longd av ritgerð fyri einstaklingar og bólkar á í mesta lagi tvey lesandi. Tó kunna einstaklingar vegleiðandi brúka lægru síðutølini, og bólkar hægri síðutølini.

Ritgerð á 30 ECTS kann gerast uppá hálva tíð yvir eitt ár, ella fulla tíð yvir hálvt ár. Ritgerð á 60 ECTS kann einans gerast fulla tíð yvir eitt ár av fulltíðarlesandi. Fulltíðarlesandi, sum ynskja at gera ritgerð á

60 ECTS ístaðin fyri at taka 30 ECTS av valskeiðum, skula søkja um hetta til útbúgvingarleiðaran seinast tveir mánaðir innan 60 ECTS masterverkætlanin ætlandi skal byrja.

Verkætlanir á 30 ECTS hava rætt til 35 tímar vegleiðing, og verkætlanir á 60 ECTS 70 tímar vegleiðing.

Ritgerðin skal vísa evnini hjá tí lesandi at nýta vísindaligt ástøði og háttalag í arbeiðinum við einum avmarkaðum evni. Studenturin velur ritgerðarevni í samráð við vegleiðara, t.d. frá Fróðskaparsetri Føroya, øðrum universiteti, almennum stovni ella privatari fyritøku, sum hevur tann neyðuga førleikan, og sum av útbúgvingarleiðara er góðkendur til hetta. Útbúgvingarleiðarin staðfestir ritgerðarevnið. Ein innanseturs vegleiðari er altíð knýttur at eini masterverkætlan, og hesin hevur ta formligu ábyrgdina. Um verkætlanin hevur ein uttanhýsis vegleiðara, hevur hesin sum útgangsstøði fakligu og akademisku vegleiðaraábyrgdina, so ritgerðin verður skipað eftir vanligum akademiskum mannagongdum. Um uttanseturs vegleiðari ikki hevur akademiskar kvalifikatiónir, so hevur ábyrgdarvegleiðarin akademisku vegleiðingina. Hesi viðurskifti skulu vera greið, áðrenn verkætlanin byrjar. Tað er uppgávan hjá ábyrgdarvegleiðaranum at finna ein góðkendan próvdómara.

Sbrt. §3 í kunngerð nr. 99 frá 17. juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya er masterritgerð vanliga einstaklingsavrik. Tó kann  ritgerðin eftir nærri avtalu avrikast av einum bólki við hægst tveimum studentum í felag. Avrikini skulu próvdømast hvørt sær. Um tveir studentar gera ritgerð í felag, hava báðir felags ábyrgd av øllum pørtum. Í serligum føri kann hjá ábyrgdarvegleiðara søkjast um, at ymsu partarnir og íkøstini av ritgerðini vera eyðmerkt. Sum útgangstøði ábyrgdast tey lesandi fyri alt innihald í felag, og eins nógv. Tað er bara um frávik er frá hesum at tilskilast skal. Hetta kann vera relevant um ósemjur millum tey lesandi stinga seg upp. Próvtøka verður skipað sum munnlig verja av masterritgerðini. Um tveir studentar hava gjørt masterverkætlan í felag, skulu teir til próvtøku hvør sær. Men framløgan kann, eftir nærri avtalu millum ábyrgdarvegleiðara og studentarnar, vera felags. Próvdøming: meting av skrivligari ritgerð, umframt munnligari framløgu og persónligari verju av ritgerðini. Próvtøkuúrslit sambært galdandi próvtalsstiga, og próvdømingin er altíð uttanhýsis.

Allar ritgerðir eru almennar. Tó kunnu ritgerðir, um haldgóðar orsøkir eru fyri tí, verða undantiknar. Dekanurin tekur støðu í ivamálum.

### 9.6 Metingarhættir (formativ og summativ meting)

Í útbúgvingini innganga hesir metingarhættir:

**Formativar metingar**: skrivligar uppgávur, verkætlanarfrásagnir og munnligar framløgur.

Hesar telja oftast ikki við í endaliga próvtalinum, men kunna vera kravdar innlatingar ella framløgur fyri at sleppa til próvtøku (sí 9.7.2). Tá er treytin, at studenturin fær hesar góðkendar, men próvtal verður ikki givið fyri hesar.  Í summum førum (t.d. í støddfrøðiskeiðum) er leypandi evaluering, og kravdir aktivitetir, ið skulu góðkennast. Próvtalið verður hereftir grundað á skrivligar innlatingar og multiple choice royndir gjøgnum skeiðið.

Verkætlanarfrágreiðingar verða mettar og skrivligar viðmerkingar (í summum førum eisini munnligar) verða givnar studentinum, og um undirvísarin metir, at frágreiðingin ikki kann góðtakast fyrstu ferð, verður studenturin biðin um at lata inn aftur við umbidnu broytingum/betringum. Í summum førum er neyðugt, at studenturin letur somu frágreiðing inn fleiri enn tvær ferðir.

**Summativar metingar**: Skrivligar próvtøkur, munnligar próvtøkur, verkætlanarfrágreiðingar og ritgerð (skrivlig verkætlanarfrágreiðing og munnlig verja).

Øll fak enda við summativari meting (próvtøku). Harafturat eru uppgávur í summum fakum (t.d. støddfrøði), har sum formativa metingin av hesum eisini gert partur av summativu metingini, tí metingarnar av uppgávunum (próvtal ella prosent), verkætlanum, og multiple choice royndum telja við í endaliga próvtalið.

## 9.7 Próvtøkur

### 9.7.1 Almennar reglur um próvtøkur

Almennar reglur eru lýstar í kunngerð nr. 99 frá 17. juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya. Studentur verður innskrivaður til allar próvtøkur, sum eru kravdur partur av útbúgvingini. Tá studentur er innskrivaður til valskeið, verður hann innskrivaður til próvtøkuna á valskeiðnum.

Afturvendir studentar eru teir, sum taka skeið uttanfyri vanligu lestrargongdina. Tað kunnu vera studentar, sum ikki hava staðið eitt skeið og tí taka tað umaftur, ella studentar sum t.d. hava verið í farloyvi. Afturvendir studentar skulu venda sær til útbúgvingarleiðaran við ynski um at taka eitt ella fleiri skeið. Studenturin, sum verður innskrivaður til viðkomandi skeið, verður eisini innskrivaður til próvtøkuna í skeiðnum.

Próvtøka er í hvørjum faki sær og verður skipað sum eitt av niðanfyristandandi próvtøkusløgum ella sum eina samanseting av hesum:

1. munnlig próvtøka
2. skrivlig próvtøka
3. munnlig verja av skrivligum avriki
4. skrivlig avrik (t.d. heimauppgávur), ið telja við í samlaða próvtalið
5. próvdøming og verja av ritgerð

Í skeiðslýsingini fyri hvørt einstakt fak er tilskilað, hvør próvtøkuháttur verður nýttur, og hvørji hjálparamboð eru loyvd at hava við til próvtøkuna. Tá talan er um innlatingar/frágreiðingar, sum skulu góðkennast sum fortreyt fyri at fara til próvtøku, men har próvtal ikki verður givið, skal studenturin hava latið frágreiðingarnar inn og fingið tær góðkendar, fyri at kunna fara til próvtøku.

### 9.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini

**Talva 4 Raðfylgjan av próvtøkum fyri parttíðarlestur**

| Lestrarhálva | Skeið | Próvtøka | Endurpróvtøka | Dømd | Stigi | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Innleiðing í tilgjørdum viti | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Hagfrøðilig læring | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| 2. | Dátugrunntøkni til stórdátur | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Maskinlæring | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| 3. | Støddfrøði – grundarlag til tilgjørt vit | Skrivlig 4 tímar | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Dátutrygd | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| 4. | Tólnet og 5G | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Djúp læring | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| 5. | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| 6. | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| 8. | MSc-verkætlan | Meting av skrivligari ritgerð, umframt munnligari framløgu og persónligari verju av ritgerðini | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 30 |

**Talva 5 Raðfylgjan av próvtøkum fyri fulltíðarlestur**

| Lestrarhálva | Skeið | Próvtøka | Endurpróvtøka | Dømd | Stigi | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Innleiðing í tilgjørdum viti | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Støddfrøði – grundarlag til tilgjørt vit | Skrivlig 4 tímar | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Hagfrøðilig læring | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Maskinlæring | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| 2. | Dátutrygd | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Tólnet og 5G | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Djúp læring | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| | Dátugrunntøkni til stórdátur | Munnlig | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 7,5 |
| 3. | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| | Valskeið/verkætlan | | | | | 7,5 |
| 4. | MSc-verkætlan | Meting av skrivligari ritgerð, umframt munnligari framløgu og persónligari verju av ritgerðini | Sum próvtøka | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 30 |

### 9.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming

Í útbúgvingini eru bæði innanhýsis og uttanhýsis próvtøkur. Ein uttanhýsis próvtøka verður dømd av undirvísara umframt vísindafólki frá øðrum hægri lærustovni ella granskingarstovni, ella fakfólki uttan fyri Fróðskaparsetrið við sama fakliga førleika. Ein treyt er, at próvdómarin ikki hevur undirvíst studentinum, sum fer til próvtøku. Í summum fakum verður skrivliga innlatingararbeiðið próvmett og telur við sum partur av endaliga próvtalinum í einum faki (sí 9.6 og 9.7.2).

Í minsta lagi 1/3 av próvtøkunum, roknað í ECTS-stigum, skulu próvdømast av uttanhýsis próvdómara. Sí Kunngerð nr 99 frá 17. Juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetrið Føroya.

Innanhýsis próvtøkur í Dátuvísinda útbúgvingini telja 0-30 ECTS av 120 ECTS, treytað av valdu valskeiðunum.

### 9.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið

Próvtøkutreytirnar og hvussu skeið vera próvdømd galdandi fyri einstøku skeiðini standa í skeiðslýsingunum.

Í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (roknað í ECTS-stigum) kunnu verða dømdar staðið/ikki staðið. Hetta er undantikið, tá talan er um avriksflutning. Sí Kunngerð nr 99 frá 17. Juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetrið Føroya.

Staðið/ikki staðið próvtøkur í Dátuvísindi útbúgvingini telja 0-30 ECTS av 120 ECTS, treytað av valdu valskeiðunum.

### 9.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Rætturin til endurpróvtøku er treytaður av, at møtt verður til regluligu próvtøkuna. Um ein studentur ikki kann møta til próvtøku vegna sjúku ella gerst sjúk/ur undir próvtøku, má studenturin útvega deildarskrivstovuni læknaváttan, sum er undirskrivað sama dag, sum próvtøkan er. Um tað er møguligt, skal studenturin boða skrivstovuni frá um sjúku, áðrenn próvtøkan byrjar. Læknaváttanin skal latast skrivstovuni skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1 viku eftir at próvtøkan hevur verið. Um læknaváttan ikki er móttikin innan freistina, verður próvtøkan at rokna sum ein ikki staðin próvtøkuroynd.

Neyðugt er við tilmelding til allar endurpróvtøkur, og freistin at melda til er 4 vikur, áðrenn endurpróvtøkan verður. Tá ein studentur hevur meldað til endurpróvtøku, er ikki møguligt at melda frá endurpróvtøkuni aftur. Um studenturin velur ikki at fara til endurpróvtøku, hóast hon/hann er tilmeldað/ur, verður endurpróvtøkan roknað sum ein ikki staðin próvtøkuroynd. Studentar, sum hóast tilmeldað, ikki møta til próvtøku í einum faki, kunnu ikki krevja, at skipað verður fyri endurpróvtøku fyri teimum í hesum fakinum. Hesi kunnu tó fara til próvtøku, um endurpróvtøka verður hildin fyri lesandi, sum annaðhvørt ikki hava staðið fakið ella vóru sjúk, tá próvtøkan var.

Til endurpróvtøkur er sum útgangsstøði sama próvtøkuslag sum til próvtøkur. Endurpróvtøkur eru lýstar í Talvu 4 og 5. Skrivlig avrik, sum undir vanligum umstøðum telja við í eini endaligari próvdøming fyri eitt fak, telja ikki við í eini endurpróvtøku, og endaliga próvtalið verður tí einans grundað á sjálva próvtøkuna. Hóast skrivligu avrikini ikki telja við í endaliga próvtalinum, tá talan er um endurpróvtøku, skulu tey, hóast tað, latast inn og góðkennast. Tó eru fak, har hetta ikki er galdandi, og tá er endurpróvtøkuformurin týðiliga lýstur í skeiðslýsingini. Kravd skrivlig avrik verða altíð latin inn og góðkend fyri at kunna fara til endurpróvtøku.

Miðað verður eftir at halda endurpróvtøku 3 mánaðir eftir regluligu próvtøkuna.

### 9.7.6 Serlig atlit

Stuðul og serlig atlit kunnu veitast studentum, sum hava serligan tørv (varandi ella ikki varandi). Hetta, vísandi til heimild í §20a í løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, sum ásetir nærri reglur um, hvør stuðul kann veitast studentum. Studenturin skal venda sær til lestrarvegleiðara um spurningar viðvíkjandi serligum atliti til lestur og/ella próvtøku. Lestrarvegleiðarin kann, um neyðugt og við játtan frá studentinum, gera útbúgvingarleiðaran varugan við, hvørji serlig atlit eiga at verða sett í verk.

## 9.8 Undirvísingarmál

Undirvísingarmálið er sum meginregla føroyskt, danskt ella enskt, og ein studentur kann ikki krevja, at undirvíst verður á øðrum máli. Vanligt er, at undirvísingin fer fram á føroyskum, norðurlendskum ella enskum. Lærubøkur og annað undirvísingartilfar eru aloftast á øðrum málum enn føroyskum.

## 9.9 Góðskriving

Mannagongdin fyri góðskriving er, at studenturin letur lestrarskrivstovuni umsóknina um avriksflutning. Umsóknarfreist til várhálvuna er 15. september, og til heysthálvuna er freistin 15. februar. Í umsóknini skal vera greitt, hvat skeið, sum er staðið, skal góðskriva annað skeið. Týdningarmikið er, at øll viðkomandi skjøl fylgja við umsóknini smb. galdandi reglugerð og vegleiðing um avriksflutning.

Útbúgvingarleiðarin letur fakundirvísara umsóknina um góðskriving til stutta viðmerking og at taka undir við. Tá hetta er gjørt, letur útbúgvingarleiðarin lestrarráðnum umsóknina saman við viðmerkingini hjá fakundirvísaranum. Lestrarráðið staðfestir síðani góðskrivingina.

Í serligum førum kann tað henda, at ein umsókn ikki kann viðgerast – t.d. um eingin møguleiki er fyri at meta um innihaldið av einum faki vegna manglandi skjalfesting. Oyðublað til umsókn um góðskriving fæst á deildarskrivstovuni.

## 9.10 Farloyvi

Studentar, ið eru innskrivaðir til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu søkja um farloyvi frá lestrinum í styttri ella longri tíðarskeið.

Treyt fyri at fáa farloyvi frá lestrinum er, at tað er møguligt hjá studentinum at taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi. Tað vil siga, at tað er møguligt hjá studentinum at taka lesturin upp aftur, har viðkomandi slepti ella at fylgja einari tillagaðari lestrarætlan, ið er góðkend av avvarðandi útbúgvingarleiðara. Studentar kunnu søkja um grundað ella ógrundað farloyvi.

Grundað farloyvi: Studentar kunnu søkja um grundað farloyvi, tá fylgjandi umstøður/viðurskifti gera seg galdandi: Sjúka ella diagnosa hjá studentinum, barnaburður og ættleiðing, aðrar serstakar umstøður (t.d. álvarslig sjúka ella deyðsfall í nærmastu familju og onnur persónlig viðurskifti so sum hjúnaskilnaður o.s.fr.)

Ógrundað farloyvi: Studentar, ið eru innskrivaðir til fulltíðarlestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu, sum meginregla, søkja um farloyvi frá lestrinum í upp til 12 mánaðir samanlagt fyri hvørja útbúgving. Til útbúgvingar, har upptøka ikki er á hvørjum ári, kann útbúgvingarleiðarin í undantaksføri geva farloyvi, ið eru longri enn 12 mánaðir, um tað er neyðugt fyri at kunna leggja eina lestrarætlan til rættis fyri studentin. Treyt fyri at fáa ógrundað farloyvi er, at studenturin hevur staðið 30 ECTS á útbúgvingini, sum viðkomandi er innskrivaður til.

Umhugsar ein studentur at taka farloyvi frá lestrinum, skal viðkomandi seta seg í samband við lestrarvegleiðaran á deildini. Studenturin og lestrarvegleiðarin kanna síðani, hvørjar møguligar avleiðingar farloyvið fær fyri restina av lestrartíðini hjá studentinum, og funnið verður fram til, hvussu studenturin á bestan hátt kann taka upp aftur lestur eftir endað farloyvi. Tá hetta er greitt, útflýggjar

lestrarvegleiðarin studentinum umsóknarblað at útfylla. Útbúgvingarleiðarin tekur endaliga støðu til umsóknina um farloyvi í hvørjum einstøkum føri.

Fróðskaparsetur Føroya kann ikki geva lyfti um, at studenturin uttan trupulleikar kann taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi. Tað er ábyrgdin hjá studentinum at kunna seg um, hvørjar møguligar avleiðingar eitt farloyvi hevur fyri lesturin hjá viðkomandi. Hetta verður gjørt í samráð við avvarðandi útbúgvingarleiðara og lestrarvegleiðara.

### 9.11 Serlig atlit (sjúka, brek og annað)

Fróðskaparsetrið kann, í ávísan mun, veita stuðul til studentar við serligum tørvi. Bæði, tá talan er um hjálparamboð, men eisini tá talan er um at leggja lesturin til rættis við støði í tørvinum hjá einstaka studentinum. Vegleiðing og nærri kunning um rættindi hesum viðvíkjandi fæst hjá lestrarvegleiðarunum á deildini.

### 9.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar (t.d. lestrarvist)

Studentar kunnu søkja um at fara á lestrarvist sum part av útbúgvingini og taka 30 ECTS á øðrum lærustovni. Um studenturin fer á annan lærustovn at taka eitt ella fleiri fak og ynskir, at fakini verða góðkend sum ein partur av útbúgvingini, so má søkjast um undangóðkenning. Útbúgvingarleiðarin og lestrarráðið á NVD staðfesta undangóðkenningina fyri at tryggja, at parturin av útbúgvingini, sum verður tikin á øðrum universiteti, er í samsvari við ásetingarnar í námsskipanini fyri útbúgvingina. Freist at søkja um undangóðkenning er 15. september til várhálvuna og 15. februar til heysthálvuna.

Oyðubløð og vegleiðing eru tøk á heimusíðu Setursins: Avriksflutningur - Setur

### 9.13 Luttøkuskyldu

Sum meginregla er ikki luttøkuskylda til skeiðini á útbúgvingin, men undantøk eru teir dagar, tá niðanfyristandandi virksemi er:

- Starvstovuvenjingar
- Kravdar framløgur
- Skrivligar frágreiðingar
- Rannsóknarferð

Um studentar ikki møta til hetta virksemi, kunnu tey ikki fara til próvtøku og harvið ikki standa viðkomandi skeið.

### 9.14 Lestrarvirkni

Umframt at kravd uppmøting er til virksemi, sum er nevnt í 9.13, verður væntað, at studenturin møtir regluliga til undirvísing. Harumframt verður væntað, at studenturin er fyrireikaður til undirvísing, luttekur í kjaki og framløgum, umframt at studenturin tekur ábyrgd fyri egnari læring.

## 9.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum

Skeið verða eftirmett kvantitativt og einsæris eftir einum felags leisti galdandi fyri øll skeið á Setrinum. Tó er ikki nakað, sum forðar fyri, at aðrar eftirmetingar (serliga kvalitativar) verða settar í verk á einstøku útbúgvingunum.

Tað er umráðandi, at studenturin luttekur í eftirmetingunum, og at úrslitini frá eftirmetingunum verða nýtt til at gera áhaldandi tillagingar á útbúgvingunum. Tískil er tað ein ábyrgd hjá studentinum at útvega vitan um, hvussu studenturin upplivir at vera lesandi á útbúgvingini umframt, hvussu studenturin hevur upplivað einstøku skeiðini.

## 9.16 Kærumøguleikar

Kæra um avgerð í samband við próvtøku ella onnur munnlig og skrivlig avrik skal sendast dekaninum á Náttúruvísindadeildini við skrivligum grundgevingum, hví kært verður. Kærufreistin er 2 vikur frá tí, at lesandi hevur fingið próvtøkuavgerðina at vita.

Sí heimild um kærur í Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kapittul 6a.

## 9.17 Vísindaligt rættlæti

Studentarnir skulu fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti og ritstuldur, og brot á hesar reglur verða undir ongum umstøðum góðtikin. Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, fær hetta altíð avleiðingar fyri studentin, og í ringasta føri kann viðkomandi verða burturvíst/ur av Fróðskaparsetrinum. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er tá studenturin letur uppgávu inn, sum studenturin ikki sjálv/ur hevur skrivað ella letur somu uppgávu inn fleiri ferðir. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, og hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum. Skrivligar uppgávur verða kannaðar fyri ritstuldur við URKUND-skipanini.

## 9.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv

Eingi formlig krøv eru um nær lesandi í seinasta lagi skal hava staðið endaligt prógv.

## 9.19 Treytir um broyting í námsskipan

Tá broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu studentarnir kunnast um í hvønn mun tey fylgja broyttu námsskipanini ella fylgja eldri námsskipan. Herundir skulu studentarnir kunnast um tíðarfreistir at gera lesturin lidnan eftir eldri námsskipan. Um tað ikki eydnast studentinum at gera lesturin lidnan innan ásettu freist, má søkjast um at fáa tann partin av útbúgvingini, sum hevur fylgt eldri námsskipan, góðskrivaðan, áðrenn farið verður at fylgja nýggju námsskipanini. Tá verða yvirskipaðu mannagongdirnar í sambandi við góðskrivingar fylgdar (sí punkt 9.9).

Um bygnaðurin á útbúgvingini ger tað møguligt, kann tað standa studentinum í boði at skifta frá eldri námsskipan til nýggja.

## 9.20 Aðrar ásetingar